# Eldur í ruskspann á Jinx





*Sigarettstubbar, sum verða tømdir í hesa spannina, festu í pappír í spannini – og tað elvdi til nógva roykin á Gallarí Jinx hósnáttina*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast nógvan royk, so var eingin skaði av tilburðinum á Gallarí Jinx í nátt. Eftir at café'in varð vaskað, kundu tey lata upp aftur á middegi í dag**

**ELDUR**
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Um hálvgumtveytíðina í nátt varð boðað frá eldi á Gallarí Jinx á Áarvegnum í Havn. Fólk varnaðust nógvan royk inni á café'ini og boðaðu alarmsentralinum frá.

Vit vóru sera heppin í óhepni, tí eldurin gjørdi ongan skaða. Vit vaska nú og lata upp á middegi, sigur Florenze Ólavsdóttir, stjóri í Gallarí Jinx.

Vakthavandi á politistøðini í Havn sigur, at talan var um eld í einum ruskílati, og at løgreglan ikki ger meira við málið.

Tá sløkkiliðið kom á staðið, var sera nógvur roykur inni. Talan var um eina stálspann, tey nýta at tøma øskubikør í. Ein glóð frá sigarett festi í og elvdi til nógva roykin.

Florenze Ólavsdóttir sigur, at spannin stóð soleiðis fyri, at eldurin neyvan hevði fest í, men tey fingu kortini ein álvarsaman hvøkk.

Men vit lata helst uppaftur á middegi, ein tíma seinni, enn vit vanliga lata upp, segði Florenze Ólavsdóttir, tá vit hittu hana mitt í vaskiarbeiðinum í morgun.

Tað var um hálvgum tveytíðina, at fólk varnaðust nógvan royk inni á Gallarí Jinx á Áarvegnum í Havn. Sløkkiliðið kom beinanvegin á staðið, og hóast nógvan royk, so var eingin skaði.

# Stevnur og tiltøk fyri allar aldursbólkar

**Nesvík:** Hetta komandi árið kunnu fólk í Heimamissióníni gleða seg til mong spennandi og áhugaverd tiltøk.

Skráin fyri øll tiltøkini í 2006 eru nú vorðin almannakunngjørd, og her sæst ein heilt tyssi av døgum og vikuskiftum bæði fyri ung og gomul.

Millum tey stóru tiltøkini kann nevnast Landsungdómsstevnan, sum plagar at savna hundraðtals ungfólk eitt heilt vikuskifti. Í ár verður hetta tiltakið á Giljanesi í mai mánaði.

Eitt annað tiltak er sangskeiðið, sum á hvørjum ári verður hildið í heystfrítíðini, og har eisini hundraðtals fólk í øllum aldrum hittast til sang og tónleik eina heila viku.

Í september mánaði verða eisini trý spennandi tiltøk. Byrjað verður fyrsta vikuskiftið í mánaðinum við stórmøtum í Havn, har ein eisini skipar fyri serstøkum Nóa-degi í Nesvík.

Og vikuskiftið eftir verður ein stór og fjølbroytt missiónsstevna hildin í Leguhúsinum í Nesvík.

**sb.**



*Leguhúsið í Nesvík verður hetta komandi árið karmur um ein hóp av tiltøkum*



*Sundalagið liggur væl fyri landafrøðiliga. Og har eru eisini grundøki at fáa til tey sum ynskja tað*

# Fleiri grundøki í kommununi

**Sundalagið:** Tað eru mong sum standa á bíðilista eftir grundøkjum í høvuðsstaðnum og hava staðið har leingi.

Hava fólk hinvegin hug at búseta seg aðrastaðni á Streymoynni, so eru grundøki at fáa t.d. í Sunda kommunu, har fleiri av bygdunum í oynni eru við.

Eitt yvirlit, sum stendur á heimasíðu teirra, yvir tøk grundøki hjá Sunda kommunu vísir, at í allari kommununi eru omanfyri 30 tøk í flestu bygdum.

Flestu teirra eru í Hvalvík, har níggju eru tøk og í Streymnesi har sjey eru tøk. Hinumegin sundið eru eisini grundøki at fáa, m.a. eru seks tøk á Oyri og 2 á Oyrarbakka.

Tað er kortini bert í bygdunum Hósvík, Tjørnuvík og Saksun at einki tøkt grundøki er at fáa.

Yvirlitið vísir eisini fermeturprísin fyri hesi grundøkini. Natúrliga eru økini dýrast í Hvalvík og Streymnesi, meðan tey eru bíligast við Gjógv.

Hinvegin so sæst, at bæði á Langasandi og í Haldórsvík er fastur prísur fyri økini, sum eru til taks.

**sb.**